gult18 cyan18 magenta18 svart18



## Kia Rio



Frá Kia Motors í Fredericia verður upplýst at ein nýggjur Kia Rio kemur á danska marknaðin í august-september. Bilurin, ið verður gjørdur í fleiri útgávum, er á stødd við Corolla, Golf og Astra.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Tryggari Opel bilar



Í heyst verður trygdarútgerðin í teimum smærru Opel bilunum: Corsa, Astra og Zafira munandi økt, við tað at teir nú fáa gardinairbag. Kanningar vísa at gardinairbag minka um vandan fyri skaðum í høvdið við 90 prosentum.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Audi A4 Avant



Ein nýggjur stórur og rúmligur stationvognur, Audi A4 Avant, kemur á marknaðin í oktober. Bilurin hevur annars somu útgerð,og fæst við somu motorum sum sedan útgávan.

*Kelda: Motor Magasinet*

ÚT AT KOYRA

# Rover 75 Tourer - ein elegantur stationvognur

**Ein av best umtóktu ensku bilunum, Rover 75, ið hevur fingið nógvar virðislønir síðan hann kom á marknaðin, kemur seinni í ár sum stationvognur.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Rover 75 er ein sera elegantur bilur við klassiskum designi. innan er hann sum ein ektaður enskur bilur, við poleraðum valnøtutræ, og cremelittum instrumentum og velour ella leðursetrum. Alt eftir um man velur bilin í útgávunum Classic, Club ella Connoisseur. Koyrieginleikarnir eru merktir av fyrrverandi samstarvinum við BMW. Eftir stuttari tíð hevur Rover 75 fingið virðislønir sum World Car of the Year, Golden Steering Wheel,Worlds Most Beautiful Automobile High Class Saloon og Compact Executive Car of the Year, fyri at nevna nakrar.



*Eins og Rover 75 sedan, verður stationvognurin eisini ein sera elegantur bilur.*



*Tourer útgávan av Rover 75, verður ein praktiskur bilur. Baklúkan kemur niður á hálvan bakkúfangaran.*

### Sum stationvognur

Nú er ein stationvognur á veg. Tað er onki at takað seg aftur í at Rover 75 Tourer verður ein elegantur og praktiskur stationvognur. Baksetrini kunnu deilast 60/40. Tá setrini verða løgd niður, verður gott pláss til viðførisrúmið, umframt at eitt stórt rúm er undir botnplátuni í viðførisrúminum. Sum vit hava skilt koma Rover 75 Tourer hendanvegin so skjótt teir kunnu leverast.

Bilurin fæst við hesum motorstøddunum: 1.8 litur 4 syl. 16V við 120 hk, 2.0 litur V6 24V við 150 hk, 2.5 litur V6 við 175 hk, og ein 2.0 litur 4 syl. commonrail diesel við 116 hk.

*Kelda: Directions »Engelsk for Viderekomne«*


Shetland Cruise 2001 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00
www.team.fo

Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag



Gisting á hotelli
(í lágárstíð) úr einans ... 923,- fyri hvønn



Gisting á vallaraheimi
(í lágárstíð) úr einans ... 715,- fyri hvønn



Privat gisting
(í lágárstíð) úr einans ... 854,- fyri hvønn

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu

Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.



Ring og hoyr nærri !

e-mail: booking@smyril-line.fo


gult19 cyan19 magenta19 svart19



# Atlants Kolvetni fleiri bein at standa á

**Við at hække partapeningin og geva útlendskum íleggjarum møguliga at tekna partapening roynir Atlants Kolvetni at hava fleiri bein at standa á og eisini arbeiða uttan fyri Føroya økið**

AÐALFUNDUR
*Jan Müller*



*Kjartan Hoydal, nevndarformaður í Atlantic Petroleum sær stórar møguleikar fyri føroyska samfelagið í komandi oljuvinnuni*

Aðalfundurin hjá Atlantic Petroleum seinasta fríggjadag var tann triði felagnum. Í formansfrágreiðing síni staðfesti nevndarformaðurin Kjartan Hoydal, at bæði í 1998 og 1999 var samanfatingin: Eitt hendingaríkt ár. Og tað sama kann sigast um 2000

-Eg tori at siga, at hóast nógv er hent tey bæði fyrstu árini, so er lopið upp aftur størri í 2000, og vit hava rokkið at kalla øllum teimum fyrstu málunum vit settu okkum, kanska fyrr enn væntað.

Føroya Samtakið saman við Amerada Hess, British Gas og Dong, søkti 17. mai 2000 Føroya Landsstýri um leitingarloyvi á føroyska landgrunninum. Undan hesum legði Atlants Kolvetni stóra arbeiðsorku í at styrkja tann partin sum í loyvistreytunum stóð undir grein 4. Føroya Landsstýri seldi ikki leitingarloyvi á uppboði. Tað verður gjørt sumstaðni í meira búnum oljuøkjum. Hinvegin setti Oljumálastyrið ávís krøv um, at tey samtøk, sum søktu loyvi, átóku sær ávísar skyldur mótvegis føroyska samfelagnum.

Í hesum sambandi setti Føroya Samtakið (Faroes Partnership) sær miðvís endamál og AK var ein virkin partur í at seta hesi mál. Í oljuídnaðinum, sum byggir á vitan og nýskapan, er gransking og menning (GoM) ein týðandi partur av virksemi og íløgum. Komandi avbjóðingarnar á djúpum vatni og undir torgreiddum umstøðum krevja nýskapandi arbeiðshættir og framhaldandi batar. Tað er eisini av størsta týdningi at hava nágreiniligan kunnleika um karmarnar í samfelagi og ídnaði, sum arbeitt verður innan, og at knýta tøtt samstarvsbond í hesum umhvørvinum.

Umframt at hugsa um føroyskar granskingarstovnar í samband við GoM og virksemi yvirhøvur, setti the Faroes Partnership sær serstakliga fyri at fremja gransking og menning á føroyskum øki. Mannagongdin er at vinnan tilførir kunnleika, ikki bert um evni sum hava beinleiðis við oljuídnaðin at gera, men eisini um evni sum sum hava týdning fyri samfelagið, sum the Faroe partnership verður ein virkin løgfrøðiligur borgari í.

Endamálið er lata sín lut í eini burðardyggari hækking í virkisførinum í øllum samfelagnum til frama fyri Føroyar.

Føroya Samtakið fekk leitiloyvi á einum øki, sum verður mett at hava stórar møguleikar. Alt bendir á, at borurin verður settur í fyrst í september ár vísti Kjartan Hoydal á og helt fram:

-Í oktober 1999 fór onnur kapitalhækkingin hjá felagnum fram. Nú stendur fyri framman ein ógvuliga stór kapitalhækking, sum ikki bert stendur núverandi partaeigarum í Atlants Kolvetni í boði, men øllum føroyingum og eisini útlendskum íleggjarum. Atlants Kolvetni roynir á henda hátt at hava fleiri bein at standa á og eisini arbeiða uttan fyri Føroya økið, sum ætlanin var alla tíðina.

Vit vita ikki um olja verður funnin undir Føroyum, sum tað loysir seg at vinna og fáa til høldar, men bjartskygni hjá øllum oljufeløgum, sum hava fingið loyvi, er stórt

### Ávirkan

Sambandið við altjóða oljuvinnuna hevur longu havt ávirkan á føroyskt vinnulív og leitingartíðin fer at økja um hesa ávirkan og geva eitt fíggjarligt íkast til føroyska búskapin. Alt bendir á, at oljan kann gerast veruleiki fyrr enn vit høvdu roknað við.

Hetta reisir spurningar um, hvussu hetta fer at ávirka føroyska samfelagið til tað betra og tað verra. At hetta fær ávirkan kann eingin ivast í, men eftir mínum tykki eru fleiri grundir fyri at halda, at ávirkanin framhaldandi verður lika positiv, sum hon hevur verið higartil

Fyri tað fyrsta. Umsitingin av oljumálum er eitt dømi um, at myndugleikarnar hava haft eina hepna hond og ein umsiting, sum ikki er stór í vavi, hevur megnað at seta greiðar vinnuligar karmar. Ætlanin at binda almennar inntøkur frá oljuvinnuni í ein grunn og ikki sleppa teimum inn í almennu nýtsluna ber somuleiðis á rætta borðið. At vinnulívið í Føroyum við Atlants Kolvetni hevur megnað at lyft uppgávuna at fáa Føroyar inn í oljuvinnuna og útvegað føroyskum vinnulívi ein part av einari møguligari oljuvinnu er kanska tað mest positiva. Tey stóru vinnufeløgini hava við einum fínum orði diversifiserað og skapar hetta eisini eina betri javnvág millum alment og privat virksemi, sum vit hava so harðliga fyri neyðini.

Kjartan Hoydal kom eisini inn á spurningin um arbeiðsmegina. -Onkur óttast, at oljuvinnan fer at stjala fólk og íløgur frá øðrum vinnum í Føroyum. Fer at avlaga lønarlag og prísl egu í Føroyum. Eg haldi ikki tað er so einfalt. Føroyar eru longu í dag av ein partur av einum altjóða arbeiðs- og peningamarknaði. Sama um oljuvinnan fer at vaksa í stórum lopum, so er hetta ein veruleiki, sum ikki sleppst undan. Vit vera noydd til at brynja okkum til hetta og avbyrging er eingin loysn. Føroyskt vinnulív kemur sum vinnulívið í grannalondum okkara at sanna, at tað er kappingin um fólkið, sum avger hvør vinnur og hvør tapir í føroyskum vinnulívi. Oljuvinnan kann gera, at henda kapping kemur skjótari enn væntað, men vit mugu undir øllum umstøðum fyrireika okkum upp á hetta.

Mentanarliga hava álopið frá sjónvarpinum um fylgisveinar langt síðani lagað niður allar garðar, sum føroyingar hava hildið seg kunna goyma seg aftan fyri.

Sum heimurin er dánaður í dag, so eru vit partur av heiminum og oljuvinnan er bert enn eitt dømi um hetta. Eg haldi vit heldur eiga at síggja møguleikarnar fyri at fáa eina stóra vinnu aftrat okkara fiskivinnu, alivinnu og tænastuvinnu, heldur enn at óttast segði nevndarformaðurin, sum at enda vísti á, at sambært partafelagslógini er høvuðsendamálið hja nevndini í AK at tryggja teimum, ið hava sett pening í felagið so gott avkast, sum møguligt. Tey fyrstu 2000, sum settu pening í gjørdu hetta kanska ikki bara av hesi orsøk, men alt bendir á, at tey, sum hava keypt partabrøv í AK fyri kurs 100 og105, hava góðar møguleikar fyri at gera eitt gott hál, tí virðið er nógv vaksið.

# Partapeningurin í Atlants Kolvetni hækkast við 100 mill. kr.

**Nevndin í P/F Atlantic Petroleum ásannar, at tað eisini finnast vinnumøguleikar fyri felagið uttanfyri Føroyar. Hesir møguleikar verða kannaðir í løtuni. Hetta er eitt mál sum stovnararnir settu sær frá byrjan, nevniliga at nýta føroyska økið sum grundarlag fyri víðari menning uttanfyri Føroyar.**

HÆKKA PARTAPENING
*Jan Müller*



*Wilhelm Petersen, stjóri í Atlants Kolvetni, sum nú víðkar um sítt virksemi*

Fríggjadagin 22. juni 2001 hevði føroyska oljufelagið P/F Atlantic Petroleum ársaðalfund. Undan aðalfundinum varð lagt upp til munandi broytingar í viðtøkum felagsins.

Tá ið felagið varð stovnað í byrjanini av 1998 varð felagið grundað á eina sera einfalda vinnuætlan (Business Plan), nevniliga at koma í eina góða støðu, tá ið leitast skuldi eftir kolvetni í føroyskum øki, og so sjálvandi at avmarka váðan mest møguligt í leitiskeiðnum.

Wilhelm Petersen, stjóri sigur, at vVið eina góða støðu meinast luttøka í einum sterkum samtaki, ið kundi vera kappingarført, tí tá ið bjóðast skuldi uppá føroysku teigðarnar. Stigtakarnarnir høvdu eisini tað grundsjónarmið, at hesuferð skuldi føroyskt vinnulív og føroyskir íleggjarar ikki standa og hyggja at meðan ein nýggj og áhugaverd vinna var við at taka seg upp í fFøroyum. Nei, luttakast skuldi frá fyrsta degi í beinleiðis í sjálvari oljuleitingini, soleiðis at eitt sterkt føroyskt sterkt oljufelag kundi mennast frá byrjan.

Wilhelm Petersen sigur, at hesin partur av vinnuætlanini hevur hepnast so væl, at nevnd felagsins undan aðalfundinum hevði mett tað rætt at taka hædd fyri víðkaðum vinnumøguleikum fyri felagið. Hendan víðkan krevur sjálvandi víðkaðar karmar fyri felagið. Um leitiskeiðið hepnast væl, og farið verður víðari til eina útbygging krevjast risastórar íløgur. Í løtuni hevur P/F Atlantic Petroleum ein luttøkupart í samtakinum The Faroes Partnership uppá 0.1 %, men hevur rætt at hækka luttøkupartin til heili 5% um leitiskeiðið hepnast væl. Um samtakið skal gera íløgur fyri eitt núú DKK 10 mia. Kr. kemur parturin hjá P/F Atlantic Petroleum við einum luttøkuparti uppá 5% at verða DKK 500 mió. Um slíkar íløgur skulu gerðast skal felagið sjálvt koma við einum stórum parti av hesari upphædd sum eginfígging. Um rætturin hjá P/F Atlantic Petroleum skal kunna nýtast fult út er tí neyðugt at hækka kapitalin.

Nevndin í P/F Atlantic Petroleum hevur eisini ásannað vísir Wilhelm Petersen á, at aðrir vinnumøguleikar finnast fyri felagið uttanfyri Føroyar. Hesir møguleikar verða kannaðir í løtuni. Hetta er eitt mál sum stovnararnir settu sær frá byrjan, nevniliga at nýta føroyska økið sum grundarlag fyri víðari menning uttanfyri Føroyar. -Tú kast kanska siga at luttøkan í føroyskum øki verður nýttur sum lopfjøl til oljuvinnuna annars.

Nevndin í P/F Atlantic Petroleum hevur eisini ásannað at aðrir vinnumøguleikar finnast fyri felagið uttanfyri fFøroyar. Hesir møguleikar verða kannaðir í løtuni. Hetta er eitt mál sum stovnararnir settu sær frá byrjan, nevniliga at nýta føroyska øki sum eitt fundament grundarlag til fyri víðari menning uttanfyri fFøroyar. Tú kast kanska siga at luttøkan í føroyskum øki verður nýttur sum lopfjøl til oljuvinnuna annars.

Um bert onkur at hesum vinnumøguleikum hepnast, kemur felagið felagið at vaksa munandi, og harvið eisini kapitaltørvurin.

Nevnmdin bað á aðalfundinum um heimild at hækka A partapeningin við áljóðandi DKK 100 mió kr. og soluleiðis at stovnað ein nýggjarn partabrævaklassa B, á eisini áljóðani eisini DKK 100 mió. Kr. B partabrøvini hava avmarkaðan atkvøðurætt í mun til A partabrøvini, men hava annars rætt til útbýti á líkafóti jøvnum føti við A partabrøvini, og eru annars frítt umsetilig. Tað verður framhaldandi A partapeningurin, ið kemur at hava avgerðarrættin í felagnum.

A partapeningurin er í dag bert áttur at Føroyingum allur á føroyskum hondum.

Stjórin í Atlants Kolvetni sigur, at aAðalfundurin á Hotel Føroyum fríggjadagin tók dyggiliga undir við viðtøkubroytingunumm.